# Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

**Spyrjari:** Henrik Old, løgtingsmaður

**Svarari:** Ingilín D. Strøm, landsstýriskvinna í umhvørvismálum

**Evni:** Um barsilsskipanina

**Spurningar:**

1. Hvussu nógvir persónar hava fingið útgjald frá barsilsskipanini, sum er minni enn 12.000 kr. um mánaðin skift á árini 2020, 2021, 2022 og 2023?
2. Hvussu nógvir persónar hava fingið barsilsútgjald, sum er minni enn 15.000 kr. skift á árini 2020, 2021, 2022 og 2023?

**Viðmerkingar:**
Javnan er spurningurin um barsilgjaldið til umrøðu, og oftast verður sjóneykan sett á, at útgjaldið er ov lágt og eigur at verða hækkað. Men vit hoyra sjáldan um tey, ið av ymsum orsøkum fáa lítið og einki útgjald úr barsilsskipanini.

Lógin um barsilsskipan sigur, at tað er kvinna, sum fer frá arbeiði orsakað av viðgongu, barnsburði ella ættleiðing, sum hevur rætt til barsilspening fyrstu 14 vikurnar. Spyrjarin er serliga áhugaður í at frætta, hvussu nógvar av hesum kvinnum hava fingið eitt útgjald, sum er lægri enn ávikavist 12.000 og 15.000 kr. um mánaðin nevndu árini.

**Á Løgtingi, 12. desember 2023**

Henrik Old